# Einki bendir á, at toski, hýsu og upsa vantar føði á Føroya Banka

**Tað vísa yvirlitstrolingar, sum Magnus Heinason gjørdi á Føroya Banka í september**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Í samandráttinum um yvirlitstrolingarnar, sum fólk frá Fróðskaparsetrinum og Fiskirannsóknarstovuni gjørdu við Magnus Heinasyni á Føroya Banka í døgunum, 13-17. september í ár, verður sagt, at meira er til at toski og hýsu enn seinastu undanfarnu árini. Hinvegin er upsin í minking. Tó fekst meira av upsa fyri hvørt tóvið í heyst enn á heysti ár 2000.

Miðallongdin á toski, hýsu og upsa er á leið tann sama sum í fjør.

Neyvt sigur frágreiðingin, at miðallongdin á toskinum var 79 cm., og mest var til av 2 og 3 ára gomlum toski. Hetta er fiskur, sum er umleið 60 og 75 cm. til longdar. Miðallongdin á hýsu var 38 cm., og mest var av støddunum, 15 cm., 25 og 50 cm. Tað er hýsa, sum er avíkavist 0, 1 og 3 ár gomul. Lítið var til av 2 ára gamlari hýsu. Miðalstøddin á upsanum var 60 cm.

### Væl fyri

- Kanningarnar vístu, at toskurin, hýsan og upsin á Føroyabanka eru væl fyri, og einki er sum bendir á, at fiskinum vantar føði, siga tey fýra, Arnold Henriksen, Rógvi Mouritsen og Marit Pedersen frá Fiskirannsóknarstovuni og Eyðfinn Magnussen frá Fróðskaparsetrinum.

Mátingar av hitanum vístu, at sjógvurin við botnin er heitari enn seinastu undanfarnu árini. Miðalhitin hendan túrin var 10,92 °C. Hetta er 0,4 °C heitari enn somu tíð í fjør, tá hitin var 10,52 °C.

- Enn er ov tíðliga at siga, um hendan gongdin fer at halda fram, men hesin hitavøkstur varð eisini staðfestur á váryvirlitistrolingini seinast. Tá var miðalhitin 0,39 °C heitari enn á vártúrinum í 2001, 8,20 °C móti 7.81 °C í 2001.

### 400 nytrur

Høvuðsendamálið við túrinum hjá Magnusi Heinasyni var at fáa eitt mát fyri nøgdina og lívfrøðina hjá teimum týdningarmestu fiskasløgunum á Føroyabanka. Eisini vórðu tey havfrøðiligu viðurskiftini á Bankanum kannaði.

Reiðskapurin, sum nýttur varð til royndirnar, var 116 fóts kassatrol við 40 mm. meskum í posanum og við vanligum grunni. Breidlarnir vóru 60 m. og 120 m. Lemmarnir vóru av slagnum, Steinhamns, og síðan nýttu tey ein minilog temperatur-og dýpdarmátara, Sea-Bird CTD og ein WP-2 glúp.

Á túrinum miðjaðu tey eftir at taka 400 nytrur av toski, hýsu og upsa, men bert 259 upsanytrur vórðu tiknar, tí ov lítið var at fáa.

### Heitari sjógvur

Í talvu er miðalhitin við botnin vístur fyri hvørt tov. Her sæst, at hitin liggur millum 8,26 og 11,50 °C. Sjógvurin var heitastur inni á Bankanum og kólnaði so út móti kantinum. Hesin hitamunur kemst av, at tann grunni sjógvurin inni á Bankanum um summarið verður hitaður av sólini og av tí, at luftin tá er heitari enn sjógvurin. Um veturin og tíðliga um várið er tað øvut; tá er tann grunni sjógvurin kaldastur. Síðan 1997 hevur miðalhitin við botnin í 2002 verið tann heitasti í hesum tíðarskeiði. Miðalhitin hendan túrin var 10,92 °C. Hetta er 0,4 °C heitari enn somu tíð ár 2001, tá ið hitin var 10,52 °C.

- Enn er ov tíðliga at siga, um hendan gongdin fer at halda fram, men hesin hitavøkstur varð eisini staðfestur á váryvirlitistrolingini seinast. Tá var miðalhitin 0,39 °C heitari enn á vártúrinum í 2001, 8,20 °C móti 7,81 °C. Kaldasta árið í tíðarskeiðnum, 1997-2002, var í 1999, tá ið miðalhitin var 10,44 °C.




*Yvirlitstrolingarnar, sum Magnus Heinason gjørdi á Føroya Banka í heyst, vísa, at fiskurin á Bankanum er væl fyri og einki er, sum bendir á, at honum vantar føði*

### Veiðan

Á túrinum í heyst fekk Magnus Heinason tilsamans 34 ymisk fiskasløg; tað eru tvey færri enn á heysti 2001. Av fiskasløgunum, sum vórðu fingin í 2001, men ikki í heyst, vóru skøta, fagurserkur og búksvartur hávur. Haraftur-ímóti fekk Magnus Heinason 5 fiskasløg í heyst, sum ikki vórðu fingin í fjør, nevniliga hemara, svartfisk, kikarafisk, hvasshvoysu og hvíting.

Samlaða veiðan á heysti 2002 var 49.569 kg. Í 2001 gav túrurin 35.198 kg.

Í talvum verður greitt frá, hvussu nógv varð fingið í hvørjum tóvi av hvørjum einstøkum fiskaslagi. Mest verður gjørt burtur úr toski, hýsu og upsa.

### Toskurin væl fyri

Toskaveiðan á Føroya Banka í heyst var sløk 14.000 pund, og toskur varð fingin á 25 av teimum 28 støðunum, ið roynd vórðu. Toskur fekst yvir tað mesta av Bankanum, undantikið á trimum leiðum, har djúpt var.

Mest var av toski, sum var umleið 60 cm. og 75 cm. til longdar. Hetta er 2 og 3 ára gamal fiskur. Miðallongdin var 79 cm. Í fjør var miðallongdin 78 cm. Hetta er nakað minni enn undanfarin ár, tá miðallongdin á toski hevur verið millum 85 til 90 cm. Hetta kemst av, at nú er meira til av smærri toski enn undanfarnu árini, tá so at siga bert stórur toskur hevur verið at fingið á Bankanum.

Fiskurin á Føroyabanka er væl fyri, og einki bendir á, at honum vantar føði.

### Hýsan veksur

Yvirlitstrolingarnar í heyst góvu tilsamans 33.878 kg. av hýsu. Hýsa var at fáa yvir tað mesta av Bankanum, tó mest inni á tí grunna. Miðallongdin var 38 cm., ið er júst tað sama sum í fjør.

Síðan á heysti 1991, hevur hýsuveiðan á Bankanum øll árini verið í støðugum vøkstri. Miðalveiðan av hýsu hendan túrin var væl hægri enn túrin árið fyri, nevniliga 1.210 kg. fyri hvønn fiskitíma hesaferð móti 693 kg. í 2001.

### Minni upsi

Samlaða veiðan av upsa var 2.739 kg., og størsta tóvið varð fingið í útsynningshorninum av Bankanum. Miðallongdin var 60 cm., og hetta er á leið tað sama sum árið fyri, tá miðallongdin var 56 cm. Miðalveiðan hendan túrin var 98 kg. fyri hvørt tóvið, og tað er væl minni enn í 2001, tá miðalveiðan var 229 kg. Í heyst var tó meira at fáa í hvørjum tóvi enn á heysti ár 2000.




*Toskur og hýsa eru í vøkstri á Føroya Banka, men minni var av upsa á heysti 2002 enn árið fyri, tó meira í 2002 enn í ár 2000.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*





*Einir 120-125 mans vóru á landsfundi FF's mánadagin. Tað er eitt miðalár til undirtøku.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Trygd og trivni á landsfundi FF's

**Føroya Fiskimannafelag setir nú í enn størri mun kikaran á trygdina og trivnaðin umborð á okkara fiskiskipum**

LANDSFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*

Umleið 120-125 mans vóru møttir á landsfundi Føroya Fiskimannafelags, tá ið fundurin varð settur av formanni felagsins, Óla Jacobsen, seinasta mánamorgun.

Okkurt árið vóru fiskimenninir fleiri í tali, men teir hava eisini verið færri. Undirtøkan í ár er sostatt umleið miðal.

Í mong ár hevur Fiskimannafelagið hildið sín árliga landsfund millum jóla-og nýggjárshøgtíðina, tí hetta er tíðin, tá ið flestu fiskimenn eru heima.



*Óli Jacobsen hevur sitið sum formaður í Fiskimannafelagnum síðan 1971 - ella í meira enn 30 ár.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Trygd og trivni

Tað var serliga felagið, Fiskimannakonur, sum fyri fleiri árum síðan setti dagsskránna um trygd og trivnaðin umborð á okkara fiskiskipum. Hetta felag hevur virkað í neyvum samstarvi við FF, men seinnu árini hevur líkasum minni lív verið í felagnum.

Kanska er tað soleiðis, at fiskimenn í tí dagliga hava hugsað minni um trygdina umborð enn konurnar ella familjan, sum sita heima.

Í øllum førum er kikarin við tíðini settur meira á hesi viðurskifti, og á landsfundinum í ár gjørdi Føroya Fiskimannafelag nógv burtur úr hesum evni.

### Rætti vegurin

- Vit hava sett kikaran á hesi viðurskifti. Her gongur rætta vegin, men hetta er nakað, sum tekur tíð. Fiskimenn fegnast um tey framstig, sum eru hend, har skip eru umbygd, og manningarumstøðurnar eru betraðar. Einstøk nýggj skip eru eisini komin í flotan, og onnur góð skip eru keypt úr útlandinum.

Soleiðis segði Karl Isaksen, sum er ein av sýsluformonnum FF's, við Sosialin í døgurðasteðginum mánadagin, tá ið landsfundurin varð hildin í Norðurlandahúsinum.

Gesturin á landsfundi FF's hendan dagin var Óli Hans Hammer Olsen, sum er stjóri á Skipasýninum.

Eftir døgurðasteðgin røddi hann um trygd og trivnað hjá sjófólki okkara og legði upp til kjak um evnið.

### Eitt gott ár

Á landsfundinum kundu stjórn og fiskimenn eisini fegnast um positivu gongdina hjá flest øllum veiðibólkum, tí árið 2002 er sum heild eitt tað besta hjá fiskiflotanum í skjótt 100 ára gomlu søgu felagsins.

Ísfiskavinnan hevur ongantíð havt tað betur, og væl hevur gingist hjá nótaflotanum - um enn ikki eins væl, sum árið fyri, ið var eitt framúr gott ár.

Tann skipabólkur, sum hevur tað tyngst, er rækjuflotin, men eisini hann hevur megnað at hórað undan.

# – Vit bíða eftir semingsmonnunum

**- Tað er rættiliga hugstoytt og leingir bara um pínuna, at skip loysa undir verkfallinum, sigur Ellintur M. Abrahamsen**

SÁTTMÁLASTRÍÐ
*Vilmund Jacobsen*

30. desember vóru Ellintur M. Abrahamsen, formaður í Føroya Skipara-og Navigatørfelag, Jákup Sólstein, formaður í Føroya Reiðarafelag og umboð fyri nótaskipini á einum óformellum fundi um støðuna, nú veiðiflotin hevur verið raktur av verkfalli síðan, 18. desember.

### Óformellur fundur

Ellintur sigur, at hetta var ein óformellur fundur, har partarnir fingu høvi at greiða frá sínum sjónarmiðum og annars tosa saman um støðuna.

- Hetta var ikki nakar semingsfundur, og eingin nýggjur fundur er avtalaður, sigur hann.

Ellintur veit at siga, at annar semingsmaðurin, Suni S. Jacobsen, ringdi nýggjársaftan og segði, at feløgini fóru at frætta frá semingsmonnunum í nærmastu framtíð, sum formaðurin hjá skiparum og navigatørum tekur til.



*– Tað leingir bara um pínuna, um skip loysa undir verkfallinum, sigur Ellintur M. Abrahamsen*

- Nær ein nýggjur fundur verður, vita vit ikki, men sum er, bíða vit eftir semingsmonnunum. Tað eru teir, sum kalla til fundar, soleiðis sum støðan er, sigur hann.

### Leingir pínuna

Sum kunnugt, hava nøkur skip loyst millum jól og nýggjárs, hóast tey eru fevnd av sáttmálanum millum FSN og FR. Skipini, sum eru nevnd í hesum sambandi, eru eitt nú Sæborg, Sjóborg, Fríðborg og Norðleivur.

Ellintur veit at siga, at Vesturfarið og Skarðhamar eisini hava verið úti, men hesi eru ikki fevnd av sáttmálanum, sum stríð er um.

Hvørjum sáttmála, hesi skip virka eftir, veit Ellintur ikki at siga.

Formaðurin í Føroya Skipara-og Navigatørfelag heldur ikki, at nakað skip, sum er fevnt av sáttmálanum hjá felagnum, er úti í løtuni.

- Tað er rættiliga hugstoytt og leingir bara um pínuna, at skip loysa undir verkfallinum. Vit vóru í samband við onkran av monnunum í nevndu feløgunum, sum lótu skipini fara. Hesir søgdu, at teir loystu ikki, meðan sáttmálastríð er. Kortini lótu teir skipini fara útaftur, og tað er hugstoytt, sigur Ellintur M. Abrahamsen.